# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føroya Felag móti Krabbameini havt aðalfund

Felagið hevði ársaðalfund mikudagin 20. apríl 2006, har m. a. val av nevnd var á skránni.

Í nevndini sita nú: Jákup N. Olsen, Helena Dahl Olesen, Agnar á Dul, Davina Lamhauge og Erik Wandall

Tiltakslimir eru: Jónvør Christiansen og Birita Ludvíksdóttir Poulsen.

Nevndin hevur skipað seg: Jákup N. Olsen, formaður, Helena Dahl Olsen, næstformaður, Agnar á Dul, kassameistari.

Í nevndini fyri Hjálpargrunnin sita: Jákup N. Olsen, Helena Dahl Olesen,og Erik Wandall.

## Minningarorð um
# Ann Larsen-Lechuga
### f. 2. juli 1959 – d. 4. november 2005

Tað kennist svárt at skriva minningarorð um teg, Ann góða. At tú bert skuldi røkka teimum 46 árunum er fyri meg púra óskiljandi, tí hóast eg visti, at tú hevði fingið herviliga krabbameinssjúku, so vardi tað neyvan nakran, at tú mátti lúta stytri enn eitt ár eftir, at sjúkan varð staðfest.

Vit báðar komu at kennast í 1975, tá ið tú komst til Nyborg at ganga á studentaskúla og eisini skuldi búgva á kostdeildini. Fyri okkum fáu føroyingum, ið har búðu, gleddust vit um, at tú komst har. Títt lætta lyndið var sera týdningarmikið fyri okkum, nú vit vóru í fremmandum umhvørvi. Miðvís og djørv vart tú sum fáur, og at gera sum hini legði tú onki í. Júst hetta sást aftur, tá ið tú valdi grein á studentaskúlanum, har tú valdi at fáast við grikst og hebraiskt, ið bert nakrir fáir næmingar á øllum skúlanum fingust við.

Eftir lokið studentsprógv gekk leiðin til Keypmannahavnar, har tú eisini búsetti teg tvey ár seinni. Hesa tíðina sóust vit javnan, og altíð vart tú so jalig og skemtingarsom. Seinni fórst tú undir útbúgving og gjørdist korrespondentur í enskum og sponskum. Á einari námsferð í Madrid í Spania, møtti tú so José og av hesi orsøk flutti tú til Spania.

Hóast vit vóru flutt heimaftur til Føroyar og tú flutti til Spania, har tú fekst familju og arbeiddi, so hildu vit sambandið okkara millum. Vit skrivaðu brøv, og nógv var at skriva um, nú tú hevði átt títt fyrsta barn, sonin Einar.

Eftir seks árum í Spania treivst tú somikið illa, at tú kendi teg noyddan at flyta til Danmarkar aftur, har tit síðani hava búleikast og í hesum tíðarskeiðnum eru Thor, Liv og Maj født.

Tú starvaðist m.a. á fyritøkuni ”Berlitz”, har tín uppgáva í mestan mun var at týða til enskt - skjøl, ið danska stjórnin skuldi nýta í ES. Eisini minnist eg, at tú segði mær, at tit sjálvi skuldu samráðast við leiðsluna um egnan lønarsáttmála. Tær eydnaðist at fáa í lag eina stak góða lønaravtalu, men fremst í huganum vóru hóast alt børnini og tað var týdningarmikið fyri teg, at fáa sum mest tíð saman við teimum. Eftir hetta royndi tú at fáa alt tað foreldraorlov tú kundi, sjálvt um tað hevði við sær, at tú fekst verri fíggjarkarm og harafturat var hetta ikki altíð vældámt á arbeiðsplássinum, men tú vart miðvís í tíni raðfesting.

Í dag eri eg so takksom og ómetaliga glað fyri, at eg hevði møguleika at vitja teg, tær tríggjar vikurnar eg var í Keypmannahavn, í mars 2005. Vit fingu tosað um mangt – eisini um sjúkuna, børnini og nomið var eisini við evnið ”deyðan”. Tá var tað umráðandi fyri teg at vera vónríka, og tú royndi veruliga at vera bjartskygd, hóast eg veit, at tú eisini hevði nógvar tungar løtur, tá tú hugsaði um børnini, ið bert vóru 7, 9, 12 og 22 ára gomul.

Tú greiddi mær eisini frá, hvussu gott samband tú hevði við prest, ið vitjaði teg dúgliga, og at tit báðar fingu tosað um øll lívsins viðurskifti.

Hesa tíðina í Keypmannahavn sást, at megin byrjaði at ganga undan, og tú gjørdist skjótt móð og mátti leggja teg. Tungt var at siga tær farvæl, Ann, tí vit vistu ikki, um hetta varð tað seinasta, ið tað tíverri gjørdist.

Síðan mars 2005 tosaðu vit báðar bert í telefon og eg minnist, hvussu glað eg varð í oktobur, tí tú hevði tað so gott. Tit skuldu halda 7 ára føðingardagin hjá Maj. Bert tríggjar vikur seinni, tann 4. nov. komu so deyðsboðini og æviskeið títt var lokið.

At enda fari eg at takka tær, Ann góða, fyri tey góðu minnir og tær hugnaligu løtur, ið vit høvdu saman.

Góðu foreldur, José, Einar, Thor, Liv og Maj. Tað er mín vón, at tit finna styrki í hesu døpru tíð.

Við hesum vil eg lýsa frið yvir minninum um góðu vinkonu mína, Ann.

**Karin Maria**

## Eli á ting fyri Poul

Fyri fyrstu ferð er Eli Christian komin inn á ting umboðandi Fólkaflokkin. Hann er komin inn fyri Anniku Olsen, sum er næsti maður á listanum, aftan á Poul Michelsen í Suðurstreymoyar valdømi.

Poul Michelsen er farin í farloyvið í 10 dagar. Eli Christiansen er útbúgvin siviløkonomur og starvast dagliga sum umsitingarleiðari á Fiskirannsóknarstovuni.



# 10 politikarar úr Vági

*Hesa myndina tók Regin Dalsgaard av politikarum, sum allir hava tað felags, at teir annaðhvørt eru heilir ella hálvir vágbingar. Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum, Poul Michelsen úr Fólkaflokkinum, Jacob Vestergaard úr Fólkaflokkinum, John Dahl uttanflokkatingmaður, Hergeir Nielsen úr Tjóðveldisflokkinum, Rósa Samuelsen úr Sambandsflokkinum, sum í løtuni hevur sæti á tingi fyri Marjus Dam, Hans Pauli Strøm úr Javnaðarflokkinum, Óli Breckmann úr Fólkaflokkinum, Henrik Old úr Javnaðarflokkinum og John Johannessen úr Javnaðarflokkinum.*

## Dagurin í morgin

**27. apríl. Ánanias**, deyður ár 375. Kristin munkur, sum varð tikin av døgum í Persia. Summir halda, at her er talan um tann Ánanias, sum er umtalaður í Ápostlasøguni 9, 10-19.

*Fríðrikur Petersen doyði hendan dagin í 1917.*